## Drogba vil betra seg

Ivoryanarin, Didier Drogba, hevur manað alla spekulatión í jørðina eftir at hann í síðstu viku longdi sáttmálan við Chelsea við tveimum árum, so hann verður verandi á Stamford Bridge fram til 2012. Sambært Sky Sports tekur hann einki fyri givið, og metir seg hepnan at hava framtíðina tryggjaða, eftirsum hann hevur nógvar fótbóltsvinir í Fraklandi, sum standa uttan sáttmála. Royndi áleyparin sigur seg enn kenna seg ungan, hóast hann er farin um tey 30, og hann hugsar als ikki um, hvussu long karrieran enn kann gerast. Hann var við til at vinna fyrsta steypið á árinum, tá Chelsea vann á Manchester United í Community Shield dystinum á Wembley sunnudagin.



## B71 snávaði

Seinasti dysturin í 18. umfari í 1. deild var í gjárkvøldi, tá B71 vitjaði NSÍ í Runavík. B71 hevði kundi við einum sigri leggja seg ájavnt við VB/Sumba í stigum á fyrsta plássinum, við eini betri málúrtøku enn suðuroyarliðið. Men NSÍ vann dystin 4-1 við málum frá Helga L. Petersen, Árna Frederiksen, Tórodd Thomsen og Jens Joensen, meðan íslendingurin Gassi skoraði fyri NSÍ.



Bjørg Syderbø, AB, roynir at sleppa fram við Marin Gregersen og Evi Mikkelsen, Skála, í dystinum á Argjum leygardagin, sum AB vann 2-0

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# AB lænir oddasessin

**Leygardagin fór kvinnukappingin í gongd, og AB legði fyri við at vinna á Skála, meðan B68/NSÍ fekk ikki mannað lið ímóti Víkingi. Triði dysturin í hesum umfarinum verður spældur hósdagin, tá KÍ tekur ímóti EB/Streymi**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Eftir ein steðg í yvir ein mánað, fór landskappingin í 1. deild hjá kvinnum í gongd aftur leygardagin, tá tveir dystir vóru á skránni. AB tók ímóti Skála, og her gjørdist talan um ein favorittsigur, hóast munur stórt sæð ikki sást á liðunum fyrr enn í seinna hálvleiki.

At hetta var fyrsti dysturin hjá AB-kvinnunum síðani steypasigurin á KÍ fyrst í juli mánaði, var kanska ein orsøk til, at liðini tóktust sera jøvn fyri steðgin, tí AB megnaði ikki rættiliga at skapa tær avgerandi støðurnar. Men ein onnur orsøk, ið helst er minst líka sannlík, er at skálakvinnur stríddust væl og royndu at geva oddaliðnum dygga mótstøðu.

AB legði bragdligari fyri, men skjótt fótaði Skála sær og meira ella minni var betra liðið væl fram ímóti hálvleikinum, tá AB aftur byrjaði at røra upp á seg og vísti, hvat væntast kundi eftir steðgin. Hálvleiksstøðan var 0-0.

### AB fekk hol á

Nokk so skjótt í seinna hálvleiki kom eisini til sjóndar, at AB veruliga vildi vísa seg sum tann favorittur, liðið var, og eftir spæl í sjey minuttir gjørdist 1-0 til heimaliðið. Trunkaspæl var framman fyri málinum hjá Skála, og har eydnaðist Elin K. Thomsen at enda fáa bóltin í málið.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki øktu kvinnurnar hjá AB. Mona Breckmann, sum eina viku frammanundan var blivin føroyameistari í 100 metra renning, vísti sín kvikleika og endaði eitt skjótálop við at senda bóltin í málið.

Fleiri mál komu ikki, og tískil vann AB dystin 2-0. Tað merkir samstundis, at AB í øllum førum hevur lænt oddasessin frá KÍ í nakrar dagar.

Eftir dystarskránni skuldu Víkingur og B68/NSÍ spælt í Norðragøtu leygardagin, men tann dysturin varð av ongum, tí felagsliðið uttan av Skálafjørðinum ikki fekk mannað lið. Sostatt vinnur Víkingur uttan dyst, við 0-0 í málskoru.

### Útsettur dystur

Triði dysturin í hesum fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin, verður spældur í Klaksvík hósdagin, tá KÍ tekur ímóti EB/Streymi. Megnar KÍ at vinna tann dystin, sum liðið í øllum førum er stórfavoritur til, eru klaksvíkskvinnur aftur oddalið. Tá koma tær upp á sama stigatal sum AB, men hava nógv betri málúrtøku.

Dysturin hjá KÍ er útsettur, tí KÍ júst hevur verið í Makedonia og spælt tríggjar krevjandi dystir í UEFA Woman's Champions League, har KÍ-kvinnurnar í sera nógvum hita taptu 0-2 ímóti Montpellier úr Fraklandi og 1-2 ímóti NSA Sofia úr Bulgaria, fyri síðani at enda at vinna 4-2 á Tikvesanka úr Makedonia.

Avrikið í makedonska býnum Strumica verður mett sum tað higartil besta hjá KÍ-kvinnunum í europeisku kappingunum, tær hava verið dúgligar at meldað seg til, og so fæst at síggja, hvat tær hava tikið við sær heimaftur, nú gerandisdagur aftur er í føroysku kappingini.

## Víkingur er í lyklastøðu

**Kappingin millum AB- og KÍ-kvinnurnar er so jøvn, at málmunurin kann verða avgerandi í síðsta enda – um ikki Víkingur »tekur avgerðina« ímóti øðrum teirra**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

AB og KÍ hava verið í serflokki í kvinnukappingini higartil. Liðini hava tapt eina ferð í part ímóti hvørjumøðrum, umframt at tey eina ferð í part hava spælt javnt ímóti Víkingi. Tí kann síðsti dysturin teirra millum, sum verður í næstsíðsta umfarinum tann 27. september, væl gerast tann ultimativa FM-finalan, tí liðini fylgjast so væl á stigatalvuni.

Enda liðini kappingarárið við sama stigatali, hevur KÍ tó ein stóran fyrimun í royndini at vinna tíggjunda FM-heitið á rað, tí KÍ hevur í løtuni eina 19 mál betri málúrtøku enn AB, sum jagstrar sítt fyrsta meistaraheiti nakrantíð. Hetta kemst av, at KÍ megnar nakað, AB enn ikki ordiliga dugir, og tað er til fulnar at revsa vánaliga mótstøðu. Eitt nú hevur KÍ vunnið ein dyst 13-1 og ein 8-0…

Meðan øll eygu eru vend ímóti teimum báðum fremstu, er tó vert at geva gætur, at ikki so langt aftan fyri tey er liðið hjá Víkingi, sum hevur staðið seg sera væl í ár. Ein góðan dag kann Víkingur saktans spæla teimum báðum fremstu eitt puss og vinna á teimum.

Tann møguleikan mugu vit eisini lata standa opnan, tí hóast Víkingur ikki vinnur FM í ár, kann liðið fyri tað koma at gera av, hvat av hinum báðum vinnur tað!

**1. deild, kvinnur, støðan**

| | | D | V | J | T | Mál | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 13 | 10 | 2 | 1 | 31- 6 | +25 | 32 |
| 2 | KÍ | 12 | 9 | 2 | 1 | 50- 6 | +44 | 29 |
| 3 | Víkingur | 13 | 7 | 3 | 3 | 27-16 | +11 | 24 |
| 4 | Skála | 13 | 4 | 1 | 8 | 16-35 | ÷19 | 13 |
| 5 | EB/Streymur | 12 | 2 | 1 | 9 | 8-37 | ÷29 | 7 |
| 6 | B68/NSÍ | 13 | 1 | 1 | 11 | 5-37 | ÷32 | 4 |